# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Faroe Dive, Klaksvík:

## Kavarar fingið prógv

**Tíðindaskriv**

Fríggjadagin 19. august 2005 fingu 4 næmingar altjóðagóðkent prógv sum Open Water kavarar frá kavaraskúlanum Faroe Dive í Klaksvík. Teir hava luttikið í undirvísing í kavarateori, kaving í svimjuhøll og kaving í sjónum.



*Næmingar eftir seinasta kavið á kavaraskeiðnum, f.v. Ingi Sørensen, Divemaster-lærlingur, Jón Ingi Johansen, Divemaster-lærlingur, Sólbjørn Sakariasson, OWD-kavari, Eli A. Borgarklett, OWD-kavari, Fríði S. Hammer, OWD kavari, Dánial Petur Abrahamsen, OWD kavari, og Janus Joensen, kavarainstruktør*

Fyri 30 árum síðan:

## Drotningavitjan í 1975



24. august í 1975 varð Vesturkirkjan í Havn vígd av Eivindi Vilhelm varabiskupi, meðan danski biskupurin Ole Bertelsen frá Københavns stift helt vígslurøðuna.

Í sambandi við vígsluna vitjaði Ingrid drotning í Føroyum saman við mongum innbodnum gestum úr Danmark. Drotningin vitjaði eisini í Vágum, í Streymoy og í Nólsoy.

Myndin her er tikin á eini móttøku í Kvívík. Saman við Ingrid drotning eru Leif Groth ríkisumboðsmaður og Dánjal Pauli Danielsen landsstýrismaður. Jóannes Davidsen úr Kvívík heldur røðu.

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1975*




HJÁLP TIL AT FESTA HUGSAN Á BLAÐ
Føðingardagar · Starvsdagar · Minningarorð

**Fært tú ikki tikið teg saman?**

Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin "Nøvn í vikuni" Tel.341800 / 216135 Teldupost: maggi@sosialurin.fo

Lesið Sosialin -so eru tit við!